# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Hvør føroysk fyritøka rennur skjótast?

Føroyskt vinnulív er av álvara í fokus í hesum døgum, og her serstakliga tann parturin av vinnulívinum, sum klárar seg væl. Um góða viku skipar Vinnuhúsið fyri árliga vinnudegnum, har kosin verður ársins fyritøka. Í dag verður so eitt tiltak í Havn, sum eisini snýr seg um at finna fyritøku, sum hevur staðið seg væl.

Íblásturin til hetta tiltakið kemur úr Danmark, har vinnublaðið Børsen finnur fram til ta fyritøkuna, sum veksur skjótast.

Tað er føroyska fyritøkan BUSINESS-LINE, sum saman við BØRSEN og Eik Banka, skipar fyri spennandi vinnufundi, har ljós verður varpað á VINNARAFYRITØKUR, sokallaðar gazellefyritøkur, tvs. feløg í Føroyum, sum vaksa skjótast. Tiltakið verður í Eik Banka í dag kl. 16.

Hvat snýr hetta seg so veruliga um! Gazellur eru fyritøkur, ið hava megnað at skapt ein serliga skjótan vøkstur seinastu 4 árini. Tann mest grundleggjandi treytin fyri at verða Gazella er, at Bruttovinningurin skal verða tvífaldaður seinastu 4 árini, samstundis sum onki av ársins úrslitum áðrenn skatt skal hava hall.

Í okkara grannalondum verður nógv gjørt burturúr hesum vakstrarfyritøkum og í Danmark er tað dagblaðið Børsen, saman við Jyske Bank, ið skipa fyri vinnuráðstevnum, har vinnarafyritøkurnar verða funnar og heiðraðar.

Høvuðsnavnið á vinnufundinum er ongin minni enn Leif Beck Fallesen, ið bæði er leiðandi blaðstjóri og fyritøkustjóri á danska dagblaðnum BØRSEN. Á fundinum fer stjórin í Business-Line, Finnur Sivertsen at svara spurninginum: Hví skulu vakstrarfyritøkur fram í ljósið og føroysku vinnulívsleiðari fer at tosa um, hvønn týdning vøkstur hevur í hansara fyritøku. Á tiltakinum verður ársins vakstrarfyritøka í Føroyum 2007 kosin. Umframt at onnur eisini fara at røða um vinnulív. Sosialurin verður við á tiltakinum í dag og fara vit at gera nógv burtur úr hesum serstakliga í vinnupartinum av blaðnum týsdagin, nevndur "VINNAN".

Tað skal vera okkara vón, at lesarar og viðskiftafólk okkara fara taka væl ímóti royndum okkara at raðfesta vinnulívið hægri í miðlum okkara og harvið eisini at geva sítt íkast til at gera vinnupartin av Sosialinum meira áhugaverdan og aktuellan hvønn blaðdag, men serstakliga týsdagar, tá vit gera meira burtur úr vinnuni sum heild, heima sum úti.

**Sosialurin**

## Rasisma og hví?????

SVENN OLSEN

Trygdarleiðari hjá GÍ

**Viðmerkingar til Rasismumálið GÍ- B36**

Lat meg staðfesta beinanvegin at eg persónliga og Gøtu Ítróttarfelag, taka kraftiga avstand frá øllum ið hevur við rasismu at gera, eisini hendingini í Gøtu í dystinum millum GÍ og B36.

Nú dómur er fallin í málinum, standi eg púrasta spyrjandi yvir fyri grundgevingini fyri dóminum. Sjálva sektina, 10.000 kr. havið eg ikki aðrar viðmerkingar til, enn at tað kann gerst dýrt fyri feløgini.

Øll kunna jú koma út fyri tílíkum atburði frá áskoðara og vit skula minnast til, at tað bert er felagið, ið leikar heima, sum kann revsast fyri hvat áskoðarinir gera/siga. Teir eiga jú dystin og alla ábyrgdina. Hettar kann tí saktans nýtast sum eitt vápn til at hevna seg inn á onnur feløg. Ein kann møta til dyst á útivølli og bera seg óhøviskt at, og felagið, sum eigur heimavøll, verður straffað. Vónandi hendir tað ikki, men tað verður í øllum førum ringt at geva øllum munnkurv í Gundadali tá til dømis HB og B36 leika

Aftur til niðurstøðuna hjá Aganevndini. Staðfestingarnar sum Aganevndin nýtur, kenni eg als ikki aftur.

Tað er rætt at eg ikki hoyrdi orðini ið søgd vóru, men eg sá leikaran vísa einum hvørjum uttanfyri vøllin "fingurin", og eg sá eisini hjálpardómaran reagera uppá eitthvørt ca 3 sekund eftir at eg sá fingurin. Havið seinri fingið váttan fyri, at hjálpardómarin reageraði uppá rasistisku orðini, og at hann reageraði **beinanveg** tá hann hoyrir okkurt "rasistiskt" Orðið BEINANVEG er sera avgerandi fyri, um tað er áskoðarin, ið provokerar leikaran, ella umvent. Eg veit at eg sá fingurin hjá Santos, væl áðrenn eg sá hjálpardómaran reagera, so kunna tit sjálvi meta, um hvør provokerar hvønn! Aganevndin veit ikki.

Aganevndin staðfestir eisini, at tað sum Trygdarleiðarin og áskoðarin siga seg hava sæð, ikki samsvarar við tað sum B36 leikarin sigur seg hava gjørt.

Tað kann so sanniliga ikki samsvara. Trygdarleiðarin og áskoðarin eru komnir við tveimum ymsum frágreiðingum um hendingina, sum ikki eru eins, so báðar kunna ikki samsvara við tí frá leikaranum. Frágreiðingin frá Trygdarleiðaranum um, hvussu Santos gjørdi tá hann vísti fingurin, bleiv váttað av leikarunum sjálvum. Tað einasta sum vit ikki vóru samdir um, var í hvørjari raðfylgju allar hendingarnar vóru farnar fram. So her eru ósannindir í niðurstøðuni

Eg siti við eini kenslu av, at tí eg eri GÍ´ari, so eri eg **sjálvandi** partískur.

Dómarin í dystinum, sum einki sá ella hoyrdi um hendingina, valdi eisini at sáa iva um mína áskoðan í hesum máli. Tað skilji eg ikki, tí hann fekk skrivliga fráboðan fyri dystin, um at eg var Trygdarumboð, og um hann ikki metti meg verða skikkaðan til álitið, átti hann at gjørt vart við tað beinanveg, og ikki sum nú, sáa iva um mína frágreiðing um ein tilburð, sum hann <u>hvørki sá ella hoyrdi.</u>

Eg umboði bert GÍ í hesum málið og ikki áskoðaran. Onkur við borðið hevur helst lagt meir í orðini frá dómarinun enn eg. Tí Aganevndin nýtir einans frágreiðingina frá dómarinun sum grundarlag fyri dómin, og sær burtur frá øllum tí eg bar fram, og harvið sáar iva um mítt trúvirði, eins og dómarin.

Soleiðis sum Aganevndin, eftir mínum tykki, hevur vassað runt í teim ymsu frágreiðingum og blandað tingini saman, so skilji eg væl at tey hella til dómara frágreiðingina.

Eg skal bara heilsa her frá, eg havi ikki meir álit á tykkum enn tit á meg, men tit hava maktina

Tann største ósigurin í øllum hesum máli eigur "Kampurin móti Rasismu"

Kann ein taka næstu rasismu ákæruna frá Santos seriøst??

Eg eri 100% ivaleysur, Santos lýgur um hendingina. Eg sá at Santos vísti fingurin langt áðrenn hjálpardómarin gjørdi vart við seg og Santos sigur eisini við Dimmalætting eftir dystin, at bæði hann og hjálpardómarin fleiri ferðir, bóðu áskoðaran tiga. Tað passar ikki, og sjálvandi fer eingin hjálpardómari at loyva einum áskoðara at siga slíkt FLEIRI FERÐIR, so her gongur tú eisini lætt um sannleikan

Øll gera mistøk.

GÍ hevur alment biðið um umbering fyri hendingina, og tað átti tú harra Alex Jose Dos Santos eisini at gjørt.

Tú velur í staðin at koyra ábyrgdina fyri tín atburð yvir á onnur, og tað er ikki serliga mansligt.

Sum meir ella minni sjálvútnevndur rasismuambasadørur í Føroyum átti tú um nakar at hugsa um tín atburð á vøllinum. Somuleiðis eigur tú at taka ábyrgd av egnum gerðum og ikki sum nú, har tú gloymir sannleikan fyri at síggja út sum offur, enn einaferð.

Nei Alex, tað stutta av tí langa er, at tú rætti einum áskoðara fingurin og hesin svaraði við einum rasistiskum svari, **sum ikki kann, ella skal forsvarast.**

Í staðin fyri at angra tín atburð, roynir tú venda øllum á høvdi, so tú í almenninginum ert mestsum óskeur og einans eitt offur.

Vit sum vóru støðd við vøllin vita, eins og tú, at soleiðis var tað als ikki. Hvat skula vit halda/trúgva næstu ferð tú sigur teg verða illa viðfarnan, eg havið í øllum førum ringt við at taka teg seriøst, tá tú ikki torir at viðganga tíni mistøk.

Vís teg sum ein mann og bið um umbering, og vinn respekt millum fólk, heldur enn at stinga høvdið í sandin. Vit sóu hvat fór fram.

### Gjald fyri valgreinar

Fram til valini komandi, fólkatingsvalið 13. November og løgtingsvalið 19. Januar, fer Sosialurin at taka gjald fyri valgreinar. Gjaldið er hálvur lýsingarprísur fyri t. e. 90 oyru fyri millimeturin - tó 1,25 kr fyri fríggjadagsblaðið. At rokna sum valgreinar eru allar greinar, sum valevni skriva - og geinar frá øðrum, sum blaðstjórnin metir sum valtilfar. Skipanin verður í gildi fram til løgtingsvalið. Valgreinar skulu sendast við telduposti til post@sosialurin.fo - og tær skulu vera rættlisnar og harvið púra klárar at prenta.

***Blaðstjórin***

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.